

# Hvørjir eru vit?

Hesir menninir hava rættiliga gjørt seg út til myndatøku. Men hvat í allari víðu verð takast teir við? Eru cool ella ikki? Eru teir kanska umboð fyri IMF á veg til Íslands at loysa búskaparkreppuna har? Ella møguliga takast teir við okkurt heilt annað. Jú, tað gera teir vist nokk. Hetta er tónleikabólkurin Fede Finn & Funny Boys, sum ígjøgnum nógv ár hava spælt veitslutónleik. Og skuldi onkur havt hug at bóka teir, so lova teir eisini , at teir lata seg í ymisk klæði, ljóða væl og hava ljós og royk show. Vit kunnu ikki bíða!



## Gloym ikki hundin

Hendan samansetingin millum bilin og hundin sær eitt sindur løgin út. Spurningur er, um endamálið er, at bilurin ikki skal fara á rull, ella at hundurin ikki skal rýma. Vit siga bara eitt – gloym ikki hundin, tá tú fert í bilin!

## Ikki lætt at verða EB/

Í kioskini í felagshúsinum hjá EB/Streymi fáast nú bert gummibomm, tyggigummi og víngummi.
EB/Streymur fær tveir nýggjar spælarar úr Kekkia næsta kappingarár.
Ja, tað verða faktiskt tveir gummi-kekkar.



## Tarva-kynstur

Tarvafiktingin í Spania er populer, og vanliga endar tað við, at tarvurin er tann stóri taparin. Hesin tarvurin vísir tó rættilig kynstur, áðrenn hann verður feldur.



**Harley-hundurin**
Fólk í øllum aldri eru hugtikin av Harley Davidson motorsúkklum. Vit hava bara ikki vitað um, at eisini hundar eru við í Harley-rákinum. Her er í øllum førum ein ábending um, at so er.

# Í rangastrúpan

*Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.*

**Royna tey at endurtaka mistakið?**
Slík mistøk eiga ikki at koma fyri, og vit hava tikið neyðug stig til tess at forða fyri, at mistøk av hesum slagi ikki endurtaka seg.
**Allan Dalsgarð, KrF, umbering fyri, at "Hetta heilaga evangeliið skrivar" kom skeivt fyri**

**Sera skilagott**
Tað er eisini nokk so fornuftigt onkuntíð at fara til Bornholm ístaðin fyri alla tíðina bara at fara til Danmarkar
**Morgunroðin á Rás 2**

**Stórur biti**
Heini O. Heinesen hevur svølgt ein tann beiskasta kamelin
**ÚF**

**Og onkur má repetera bendingarlæruna**
Flogvøllur í Vágar má fáa veðurradara sum skjótast
**ÚF**

**Gongur upp og niður**
Partabrøv á flog
**Vikublaðið**

**Mundi tað ikki verða spurnarkanning**
Úrslitið av spurnarkappingini hjá Annlis Bjarkhamar millum avvarðandi hjá sálarsjúkum verður lagt fram á Altjóða Sálarheilsudegnum, sum verður hildin í Havn fríggjadagin.
**Rás2**



## Deilig pausa

Hesir løgreglumenninir, sum arbeiða eystanfyri, njóta ein steðg frá arbeiðnum. Og hvat er tað ikki herligt at fáa eina kalda øl. Teir er tó so frægir, at teir eru farnir til síðis at fáa sær eina øl.